# Svar til Jákup Suna Lauritsen, borgarstjóra í Sørvági

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



Seinastu dagarnar hevur verið nakað av kjaki um Læknavaktina, og hvat henda nýggja skipanin inniber fyri fólk kring landið. Tann spurningurin, ið serliga hevur verið umrøddur er, hvussu henda nýggja skipanin kemur at ávirka læknatænastuna og akuttu tilbúgvingina hjá teimum, sum búgva uttanfyri Havnina. Hetta er eisini tað, ið Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri viðgerð í eini grein í bløðunum herfyri, har hann millum annað vísur á, at bráðfeingistilbúgvingin er vorðin verri í Vágum við nýggju læknavaktini. Millum annað vísur hann á, at ongin bráðfeingis hjálp er at fáa, um eitt ferðsluóhapp hendir í Vágum, tí kommunulæknin situr ikki á vakt í Vágum. Eisini spyr hann beinleiðis undirritaða: Hevur landsstýrismaðurin hugsað um, hvør hjálp er at fáa, um ein vanlukka hendir í Vágatunlinum og eingin lækni er í økinum ella sleppur vestur? Ella um ein vanlukka hendi við flogvøllin í Vágum?


Eingin lækni og eingin løgregla

JÁKUP SUNI LAURITSEN
Borgarstjóri

Myndugleikarnir sundur liða trygdina í Vágum.
Nú um dagarnar fingu vit boðini um, at **okkara** læknaskipan er sett úr gildi.

feingis tøkur longur. Hendir eitt ferðsluóhapp í Vágum er eingin skjót hjálp at fáa. Læknin, sum hevði vakt í økinum, er ikki longur.
Grundgevingarnar fyri at flyta skipanina í miðstaðarøkið, er, at læknatrot er í miðstaðarøkinum, og at yngri læknar ikki fáast at søkja hesi størv.

sjálvbodna arbeiðs
Eingin keta er sterk
tað veikasta liðið
sagt. Trupulleikin
føri er, at tey
liðini møguliga
stødd, tá ið brú
um, læknin
Vit

*Svarið hjá Hans Paula Strøm er til grein í Sosialinum fríggjadagin hjá Jákup Suna Lauritsen, borgarstjóra í Sørvági, sum hann kallaði »Eingin lækni og eingin løgregla«*

**Heilsutilbúgvingin í Vágum**

Tey seinastu árini hava verið gjørdar munandi ábøtur á heilsutilbúgvingina í Vágum. Hetta meti eg sjálvandi eisini er neyðugt, tá flogvøllurin liggur í Vágum.

Tá talan er um vanlukkur, og tørvur er á bráðfeingis medisinskari hjálp, er tað **ikki** kommunulæknavaktina ein skal ringja til. Skipanin við bráðfeingis læknahjálp heldur fram óbroytt og tí skal ringjast á nummarið 112, sum vanliga sendur ein sjúkrabil á staðið. Sjúkrabilurin er mannaður við fólki, ið eru útbúgvin til at taka sær av bráðfeingis tilburðum, samstundis sum sjúklingurin/vanlukkurakt verða flutt á rætta stað. Sjúkraflutningtænasta er í Vágum og í 2005 tók undirritaði, millum annað eftir áheitan frá Vága Bjargingarfelag, avgerð um at styrkja sjúkraflutningstænastuna í Vágum. Fyri at styrkja um bráðfeingistilbúgvingina í Vágum vórðu 5 fólk sett í fast starv at røkja tænastuna. Áðrenn hetta røktu 12 fólk frá bjargingarfelagnum sjálvboðin tænastuna við síðuna av teirra vanliga arbeiði. Við hesi avgerð er sjúkraflutningstænastan í Vágum munandi styrkt.

Landsstýrismaðurin hevur eisini ætlanir um at styrkja sjúkraflutningstænastuna enn meira, og hevur júst fingið handað eitt tilmæli um krøv til útbúgvingar hjá sjúkraflutningsstarvsfólkum, og hvørji krøv til útbúnað í sjúkrabilunum skulu verða galdandi í Føroyum. Í hesum sambandi mælir bólkurin eisini til, at tað úti í lokaløkjunum í Føroyum verða útbúnir sokallaðir “First Responder”, sum kunnu rykkja skjótt út í sambandi við vanlukkur og veita tann fyrsta medisinka innsatsin, meðan bíðað verður eftir sjúkraflutningi. Eg meti, at hetta uppskotið ljóðar áhugavert og fari at viðgera tað í nærmastu framtíð, soleiðis at bráðfeingis tilbúgvingin kann styrkjast enn meira.

Landsstýrismaðurin hevur eisini hugsað um, hvør hjálp er at fáa, um ein størri vanlukka hendir við flogvøllin í Vágum ella í Vágatunlinum. Umframt eina styrkta sjúkraflutningstænastu, er eisini seinastu árini skipað eitt sjúkralið í Vágum, sum er mannað við sjúkrarøktarfrøðingum og øðrum heilsustarvsfólkum í Vágum, ið ikki dagliga arbeiða á sjúkrahúsunum. Talan er um ein bólk, sum er og framhaldandi verður skúlaður í at veita tann fyrsta medisinska innsatsin á skaðastaðnum í sambandi við størri vanlukkur/katastrofur, og tá vanliga tilbúgvingin í sjúkrahúsverkinum ikki klárar uppgávuna.

Harumframt stendur ein tyrla tilbúgvin í Vágum, ið millum annað er mannað við fólki, ið hevur tikið ambulansuútbúgving. Tá hædd samstundis verður tikin fyri, at tað einans tekur 15-20 min. hjá einum sjúkrabili at koyra frá Havnini til Vágarnar, er økið serliga væl fyri hvat heilsutilbúgving viðvíkur.

Harumframt er vert at nevna, at um onkur stór vanlukka hendir í Vágum, og neyðugt verður at tilkalla alla ta hjálp ið kann fáast, verða kommunulæknarnir eisini tilkallaðir, hóast teir ikki hava vakt. Vil heilt illa til, at hvørgin er staddur í Vágum, verður lækni antin koyrdur ella flogin á staðið, meðan allar aðrar tilbúgvingareindir, ið eg havi nevnt omanfyri, veita tann fyrsta medisinska innsatsin.

Við hesum kunnu vit øll gleðast um, at bráðfeingis heilsutilbúgvingin er so væl útbygd og ment í Vágum seinastu árini.

**Kommunulæknavaktin**

Í sambandi við arbeiðið at gera eina nýggja skipan fyri kommunulæknaøkið havi eg alla tíðina lagt avgerðandi dent á, at allir borgarar í skipanini skulu fáa góða og trygga læknahjálp, óansæð hvar í økinum teir búgva. Hetta er galdandi bæði fyri bráðfeingis læknahjálp og fyri læknahjálp uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Læknavaktin heldur til í viðtaluhølum á Landssjúkrahúsinum. Við teimum hentleikum og tænastum, sum eru har, hevur Læknavaktin her nógv betri møguleikar fyri at gera neyðugar kanningar og royndir og fáa úrslitini skjótt. Hetta hevur við sær, at fortreytirnar fyri at seta røttu diagnosuna eru munandi betri enn fyrr.

Tá borgarar hava brúk fyri læknahjálp uttan fyri vanliga arbeiðstíð hjá kommunulæknum skulu teir ringja til Læknavaktina. Læknavaktin metir um í hvørjum einstøkum føri, hvat er rættast at gera, so sjúklingurin fær bestu læknahjálpina. Hetta hevur við sær, at Læknavaktin antin kann ráðgeva umvegis telefonina, senda ein kommunulækna í nærøkinum á vitjan ella biðja sjúklingin koma inn til kanningar.

Læknavaktin er skipað soleiðis, at 3 kommunulæknar eru á vakt til á midnátt og 2 eru á vakt eftir midnátt. Umframt læknavaktina á Landssjúkrahúsinum, er ein kommunulækni á vakt í vestara øki, ið fevnir um Vágar og Streymoy, og ein kommunulækni verður á vakt í eystara øki, ið fevnir um Eysturoy og Norðuroyggjar. Aftaná midnátt er ein kommunulækni á vakt í eystara og vestara økið.

Harafturat er avgjørt, at Læknavaktin kann brúka fasilitetirnar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og í læknahølunum í øllum økinum í skipanini. Sostatt kunnu kommunulæknarnir, sum eru á vakt í nærøkinum velja at visitera sjúklingar til skaðastovuna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, eins og teir kunnu taka sjúklingar inn í viðtaluhøli á staðnum. Hetta merkir samstundis, at einki krav er um, at sjúklingarnir skulu koyra ella flytast allan vegin til Læknavaktina á Landssjúkrahúsinum.

**1870**

Við nýggju Læknavaktini er bara eitt telefonnummar at ringja til, tá fólk hava tørv á at fáa fatur á einum kommunulækna. Hetta er ein stórur bati í mun til gomlu skipanina, tá borgarin stundum mátti ringja til fleiri ymisk nummur, fyri at fáa fatur á tí kommunulæknanum, sum hevði vakt.

Sum áður nevnt, so heldur skipanin við bráðfeingis læknahjálp fram óbroytt, t.v.s. at tey sum hava brúk fyri bráðfeings læknahjálp kunnu eins og áður ringja telefonnummar 112 á alarmsentralinum.

**Eftirmeting**

Eg havi áður boðað frá, at skipanin við Læknavaktini støðugt fer at verða eftirmett, og fara vit at fremja neyðugar tillagingar, um tørvur vísir seg at verða á hesum. Sum eitt dømi um hetta er óhepna støðan fyrr í vikuni, tá summir telefonfelagar ikki kundu ringja til Læknavaktina. Beinanvegin eg varð kunnaður um málið, gjørdi eg av at seta eina kanning í verk av tilburðinum, so vit kundu fáa greiðu á orsøkini, hví hetta hendi, tí slíkt má als ikki koma fyri. Føroya Tele hevur upplýst, at ringjast kann til Læknavaktina frá øllum telefonfeløgum, sum eru staddir í Føroyum. Somuleiðis kunnu útlendingar, sum eru staddir í Føroyum ringja til Læknavaktina.

# Miðvágs Bóltfelag skipar fyri sølustevnu

SØLUSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Í døgunum 28. og 29. apríl skipar Miðvágs Bóltfelag fyri sølustevnu í Bygdaskúlanum í Miðvági. Á sølustevnuni fara handlar og fyritøkur ymsastaðni frá í landinum, at bjóða sínar vørur fram. Har verður mangt og hvat at finna. Klæðir til bæði børn og vaksin, skógvar, hárfríðkan, ymiskt til bæði innan – og uttandura ítriv, el lutir, bilar og súkklur av ymiskum slagi. Flestu luttakarar vísa sínar vørur fram inni í skúlanum, meðan bilar, 4- og sekshjólstektar motorsúkklur, telt og onnur kampingútgerð verður sýnd fram á økinum uttan fyri skúlan.

Høvið verður at keypa sær eitthvørt lætt til matna ella at vinna sær okkurt í mat tombola. Eisini skuldi hetta verið eitt frálíkt høvið hjá bæði teimum stóru og smáu at stuttleika sær. M.a. verður mótashow, Line Dance framførsla, og Trøllapætur & Omman og Nósi koma eisini á vitjan.

Sunnudagin er harumframt ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin, so ein túrur vestur í Vágar hetta vikuskiftið skuldi ligið væl fyri.

**Tónleikaundirhald**

Tónleikaundirhald verður báðar dagarnar og leygarkvøldið verður skipað fyri serligari “Tónleika Café” og “Syngið við” kvøldi í Bygdarhúsinum.

Ímeðan sølustevnan er opin, syngja Systkini á Løgmansbø, Elsa í Garði og Jana Johannesen, Fríðbjørg Jensen og Ungdómskórið í Vágum.

Á serliga tónleikatiltakinum leygarkvøldið kl.20.30 luttaka Hanus G. Johansen, Sámal Ravnsfjall, Petur Pálsson og Knút Háberg Eysturstein. Harmonikuliðið Knarkar fer at spæla undir sanginum, sum Jens Eli Elleffsen skipar fyri. Atgongumerki til “Tónleika Café” og “Syngið við” verða seld bæði í forsølu og við dyrnar leygarkvøldið. Dentur verður lagdur á at áhoyrararnir fáa eitt hugnaligt tónleikakvøld til ein sera sámuligan prís. Íroknað atgongumerki er, umframt tónleikaundirhald og skemt, ein the - ella kaffimunnur við fleiri sløgum av heimagjørdum køkum afturvið. Eisini verður møguleiki at keypa smyrjibreyð við føroyskum viðskera og annað leskiligt.

**Kamping**

Í samband við sølustevnuna í Miðvági er barnavinarliga økið við síðuna av fótbóltsvøllinum sett av til kampingvognar. Her kunnu kampingvogneigarar, sum frammanundan hava boðað frá, nýta høvið at seta kampingvogn sín á økið og halda vikuskiftisfrí í hugnaliga umhvørvinum, har stuttur vegur er til mong góð tiltøk, innkeyp, spælipláss, skate-board bana, fótbóltsvøll, sand, fjøru og viðarlund. Mong søgulig støð eru verd at vitja í Miðvági, og kann ein túrur til m. a. Kálvalíðhúsini, har Beinta búði ella til Hýsisá, har Mikkjal á Ryggi høgdi ørindi í klettin, verða sera áhugaverdur fyri bæði børn og vaksin.

Við einari sera fjølbroyttari skrá til bæði vaksin og børn bjóðar Miðvágs Bóltfelag øllum til sølustevnu 28. og 29. apríl.

**Luttakarar**

**Klæðnahandlar:**
Hali Lingeri í Klaksvík, Vestmóti í Vestmanna, Klæðnahandilin í Skálavík og La Femme í Saltangará, Barnahandilin Snák í Tórshavn, Hjá Randi í Miðvági (skógvar).

**Frítíð & ítriv:**
Marjun Heimá (seymimaskinur o.a.)
Hjá Jákup (telt o.a.)
Stubbin í Vestmanna (campingútgerð),
Súkkluhandilin í Kollafirði.

**El-útgerð:**
El – Tænastan.

**Hárfríðkan:**
Hárvist við Karin Johannesen.

**Akfør:**
Ivan Johansen Bilar
Reyni Service
Sp/f Mykines.